

Viðarlundin í Havn
Mynd: Anker Eli Petersen

# Posta Stamps Føroyar

Nr. 7
Februar 2011

ISSN 1603-0036

Europa 2011: Skógir

Bjargablómur

Tvær listaútgávur

Posta
FAROE ISLANDS







FO 708-709




Royndarprent

# Europa 2011: Skógir

**Skógarvøkstur í Føroyum**

Skógarvøkstur – ikki akkurát tað ið fellur fremst í huga, tá talan er um Føroyar – heldur tvørtur ímóti. Okkara oyggjar eru júst kendar fyri sínar træleysu fjallasíður. Veðurlag, landafrøðilig viðurskifti, mannahondin og aldargamalt seyðahald hava lagt oyggjarnar so at siga træleysar eftir sær.

**Fornar skógir**

Men soleiðis hevur ikki altíð verið. Um vit fara heilt aftur til tíðina, fyri milliónum av árum síðani, tá gosfjøllini enn vóru virkin her um leiðir, kunnu vit síggja at Føroyar í ymsum tíðarskeiðum hava verið skógvaksnar. Kolaðar viðarklótur og prent av leyvið og trænálum er funnið í kolalindunum í Suðuroy og Mykinesi – og minna um fruktarbar tíðarskeið á tí fastlandinum ið núverandi Føroyar einaferð vóru partar av. Syprisviður, taks og baraldur, risafura og ymisk leyvtrø – tað er ilt at ímynda sær í dag.

**Ísøld og landnám**

Tá fólk búsettust í Føroyum, vóru nøkur træsløg vanlig á oyggjunum. Einasta upprunaliga nálatræið var tó baraldur, ið verður hildin at hava verið vanligur runt um á oyggjunum. Tann upprunaligi baraldurin finst nú einans í Svínoy, men fólk hava funnið baraldarrøtur í torvmoldini runt um í Føroyum.

Av leyvtrøum var urtapílur, loðpílur og arktiskur pílur vanligur, men loðpílur og arktiski pílurin eru nú mestsum avoyddir orsakað av seyðinum.

Vill bjørk hevur eisini vaksið í Føroyum eftir ísøldina, men spreidd. Bjørkin hvarv tá fólk búsettust á oyggjunum.

Eisini heslitræ skal hava vaksið í Føroyum uml. ár 1000. Men hvørt tað var upprunavøkstur ella er komið við niðursetufólkunum er ógreitt. Undir øllum umstøðum hvarv heslitræið aftur uml. 13. øld, tá veðurlagið gjørdist kaldari.

**Viðarlundirnar**

Tað hevur sjálvandi altíð verið onkur hissini trævøkstur við garðar og í urtagørðum í Føroyum. Men skógarvøkstur hevur tað so



Viðarlundin í Tórshavn.
Mynd: Anker Eli Petersen

avgjørt ikki verið talan um. Í 1885 royndu menn at planta trø í størri vavi uttanfyri Tórshavn, men royndin miseydnaðist. Í 1903 royndu teir so aftur, og hesa ferð eydnaðist tað. Hetta varð til tað vit í dag rópa Viðarlundin (*Plantasjan*) í Havn. Í 1969 varð víðkað um lundina og aftur í 1979, og Viðarlundin í Havn er størsti "skógur" í Føroyum. Afturat sjálvari Viðarlundini eru eisini lundir við Studentaskúlan í Hoydølum og á Debesartrøð, har Landsbókasavnið og Fróðskaparsetrið liggja.

Í desember 1988 herjaði ein hervilig ódn í Føroyum. Vindurin kom upp um 60 metrar um sekundið, og ódnin gjørdi umfatandi skaðar á hús og trø. Stórur partur av Viðarlundini í Havn fór fyri skeyti og myndin á 10 krónur frímerkinum vísir nøkur av hesum trøum, ið enn liggja eftirá. Eitt megnar arbeiði er síðan gjørt fyri at endurreisa viðarlundina, og í dag er hon aftur eitt sera vakurt øki við ungum og gomlum trøum.

Umframt í Havn, vóru eisini aðrar viðarlundir plantaðar í byrjanini av 1900 talinum. T.d. varð tann næstan líka so kenda viðarlundin á Selatrað plantað í 1913 og árið eftir vórðu trø sett niður í Kunoy, ið verða lýst á 12 krónur frímerkinum. Økið í Kunoy var upprunaliga størri enn í dag, 17.000 m2 vóru plantaðir – men í dag eru bara 7.800m2 klæddir við trøum. Eitt serligt við viðarlundini í Kunoy er, at hon er plantað rundanum ein óvanliga stóran klett. Eggjarsteinur, ið kletturin rópast, er helst rullaður oman úr homrunum í Urðarfjallið, omanfyri viðarlundina. Eggjarsteinur sæst eisini á frímerkinum.

Tað eru síðan plantaðar fleiri viðarlundir runt um í Føroyum. Í Vági og á Tvøroyri, í Miðvági og Sandavági, í Mikladali og ikki minst tann vakra lundin Úti í Grøv í Klaksvík.

Anker Eli Petersen

*Keldur:*
*Um skógir í Føroyum, grein í Varðin 5 eftir Rasmus Rasmussen, 1925*
*Upprunavøkstur í Føroyum. Internetgrein eftir Jens-Kjeld Kjeldsen*
*Træplanting í Føroyum í eina øld. Andrias Højgaard, 1989*










FO 710-711 Royndarprent

# Bjargablómur

**Reydlig bjargablóma** *Silene dioica*
Vísindaliga navnið á bjargablómu er reydlig bjargablóma og latínska heitið er *Silene dioica*. Reydlig bjargablóma stendur í Neliksættini í slektini *Silene*. Umframt reydliga bjargablómu finst av hesi slekt í Føroyum bert leggstutt túvublóma *Silene acaulis*. Navnið tengir plantuna at hennara vakstrarstaði nevniliga bjørgunum, sum hon um summarið prýðir við sínum føgru reyðu ella stundum hvítu blómum. Í ongum av okkara grannalondum hevur hendan plantan navn, ið verður tengt at brattlendi. Sostatt verður mett, at føroyska heitið er upprunaligt.

Reydlig bjargablóma veksur í brattlendi sum heild og á støðum, har seyður ikki sleppur at, men ikki høgt uppi. Reydlig bjargablóma er sjáldsom. Hon finst ikki á teimum flestu smærru oyggjunum og heldur ikki á Sandoynni ella Eysturoynni. Reydlig bjargablóma verður roknað sum upprunalig í Føroyum, t.v.s. hon er ikki innførd av fólki, men er komin inn við vindi, havstreymi ella fugli.

Reydlig bjargablóma er heldur stórvaksin fleiráraurt, sum kann gerast upp til ein metur høg. Hon blómar í juli mánaða. Teir upprættu blómuberandi leggirnir vaksa úr einum krúpandi jarðleggi. Plantan hevur tvey sløg av bløðum, ið hava hár. Leggbløðini eru váknvaksin og uttan stelk, meðan stovnsbløðini hava langan stelk og eru øvugt eggvaksin. Tey reyðu ella viðhvørt hvítu krúnubløðini eru stórvaksin og djúpt innskorin við eini hjákrúnu.

Plantan er tvíbýlisplanta við kvenn- og kallblómum á hvør sínari plantu. Bikarið á kvennblómuni hevur 20 æðrar og bikarið á kallblómuni hevur 10 æðrar. Fruktin er eitt hylki við 10 afturábendum tonnum.



Reydlig bjargablóma
Mynd: Marita Gulklett

**Litingarsortugras** *Geranium sylvaticum*
Vísindaliga navnið á sortugrasi er litingarsortugras og latínska heitið er *Geranium sylvaticum*. Hetta er einasta slagið av sortugrasi, vit hava í Føroyum. Navnið á plantuni kemur av, at hon hevur verið nýtt at lita við, og at tað gevur svartan lit. Í Íslandi ber hon somuleiðis navn eftir, at hon verður nýtt at lita við. Í hinum grannalondum okkara bera planturnar í hesari ætt afturímóti navn eftir tí sermerkta teininum, ið veksur út úr blómubotninum eftir blómingina. Hann er ein samanvaksing av fimm teinum og líkist einum longum nevi. Soleiðis verður henda plantan t.d. á donskum rópt *storkenæb* og onnur sløg í somu ætt *tranenæb* og *hejrenæb*.

Litingarsortugras veksur her og har í Føroyum, hon verður roknað sum upprunalig, t.v.s. hon er ikki innførd av fólki, men komin inn við vindi, havstreymi ella fugli. Hon veksur í homrum og gjáum, men eisini nógvastaðni á bøi. Litingarsortugras veksur ikki á smæstu oyggjunum, hon er sjáldsom í Suðuroy og Sandoy og er vanligast í Streymoy og Eysturoy. Hon veksur í láglendi og fer ikki hægri upp í fjøllini enn 300 m hædd.

Litingarsortugras er ein fleirára urt, ið blómar í juni-juli mánaði. Hon kann blíva upp til ein hálvan metur til hæddar og hevur upprættan legg við longum hárum í erva á legginum og stuttum hárum í neðra. Bløðini eru heldur stórvaksin og fleiri ferðir innskorin. Blómurnar eru oftast bláar, men stundum reyðar. Tær eru stórvaksnar frá 10-18 mm í ummáli og standa tvær og tvær saman. Tær eru regluligar og tvíkyndar. Tey bláu ella reyðu krúnubløðini eru fimm í tali og eru ljósari, næstan hvít innast. Fruktin er eitt hylki, ið er býtt sundur í 5 stakfruktir.

Anna Maria Fosaa










FO 712-713

Royndarprent

# List:
# Bergithe Johannessen

Bergithe Christine Johannessen (1905-95) var fyrsti føroyingur, sum lærdi á *Kunstakademinum* í Keypmannahavn. Bergithe Johannessen var úr Vestmanna, dóttir heilsølu- og keypmanshjúnini Magdalenu og Niels Skaale Johannessen. Bergithe var átjan ára gomul, tá ið hon fór av landinum fyri at útbúgva seg. Fyrst gekk leiðin til London, har hon gekk á listaskúlanum *Sidcup School af Art* árini 1923-25, síðani var hon á akademinum í Keypmannahavn frá 1925 til 1931. Eftir lokna útbúgving búsettist hon í Keypmannahavn. Hon var postalínsmálari á Kongiligu Postalínsverksmiðjuni og giftist í 1939. Bergithe Johannessen var listanavn, hon skrivaðist Bergithe Rönnow Torp.

Hon var tíðum aftur í Føroyum og málaði, og hon sýndi ofta fram á Ólavsøkuframsýningum tíðarskeiðið 1956 til 1980. Bergithe hevði myndir við á stóru listaframsýningunum, sum Listafelag Føroya skipaði fyri í 1950-árunum: Færøsk Kunst í Den frie Udstillingsbygning í Keypmannahavn í 1955, Færeysk list í Listasavni Íslands í Reykjavík í 1961 og Færøysk Kunst í Bergens Kunstforening í 1970. Listasavnið eigur tíggju myndir eftir hana.

Birgithe Johannessen málaði fyrst av øllum landslagsmyndir, summar rættiliga koloristiskar vatnlitamyndir, sum lýsa landsløg, land, sjógv og himmal. Viðhvørt eru hús og seyður á myndunum, men eingi fólk.

*"Skerjut strond"* er vatnlitamynd, málað í 1964. Í forgrundini breiðir eitt summarliga grønt landslag seg út. Mitt í myndini stendur eitt hegn, sum leiðir eygað inn móti miðgrundini, og ein seyður gongur nær upsini, sum er mark millum for- og miðgrund. Í miðgrundini taka sker fram við fjøruni og klettar úti á eini vík yvir. Hinumegin víkina hómast eitt klettalandslag við sterkt grønum vøkstri undan mjørkanum, sum hongur tungur niðuryvir bakgrundina.

*"Úr Nólsoy"* er eisini vatnlitamynd málað í 1964. Her er forgrundin tvíbýtt, høgrumegin er opið út í sjógvin í miðgrundini, vinstru-



megin ber hellukent skap uppfyri. Eingi støk skap eru at síggja í forgrundini í hesi myndini eins og í hinari. Miðgrundin í hesi myndini er neyvari málað enn í hini myndini. Ein laðaður garður frá helluni og inn í bøin, rekaviður ella tílíkt, sum liggur upp móti garðinum, skapa djúpd. Eitt blágrátt nes fer tvørtur um mestsum alla miðgrundina og skilur hana frá bakgrundini, har eitt sund og eitt fjart landslag reisir seg móti hvítgráum skýggjaðum himmali við nøkrum fáum umhvarvum um skýggj, sum ganga saman í eitt og strika undir afturlatna dámin: Víkin í forgrundini er skild frá sundinum í miðgrundini, sum endar móti tunga skýloftinum. Móti tí gráa og hvíta skyggja grønu litirnir í grasinum á landi og serliga kolblái sjógvurin líva upp og skapa spenning í myndini.

Bergithe Johannessen gjørdi eisini oljumálningar. Listasavnið eigur ein, sum er málaður í 1932. Hann lýsir eina breiða á, sum í forgrundini stoytir seg gjøgnum eitt grønt landslag við síðum grasi, sum hongur út av áarbakkunum. Eitt fjall rísur brúnt upp og fyllir alla miðgrundina. Í bakgrundini liggur tunt mjørkatám um tindin og letur glottar upp út til ljósan himmal.

Í skránni til framsýningina í Keypmannahavn í 1955 skrivaði William Heinesen, at Bergithe hevði gjørt ta fínligu, varnu vatnlitamálingina til sína sergrein. Í *Weilbach kunstnerleksikon* hevur Bárður Jákupsson, skrivað, at vatnlitamáling hennara var andborin og hóvlig, og at hon dugdi væl at lýsa hugløg í føroyskum bygdaløgum og fram við strendur. Lagt eigur at verða afturat, at myndir Bergithu Johannessen umboða væl føroyska list mitt í tjúgundu øld, og at hon málaði við stórari innlivan og tryggum lit- og formskili land, bygd og hav.

Malan Marnersdóttir










FO 714-715

Royndarprent

# List: Frida Zachariassen

Frida Zachariassen var eitt tað sermerktasta listafólkið í Føroyum í 1950-árunum. Hon menti sín egna stíl, sum var eyðkendur av geometriskum skapum sett saman í kompositiónir, sum avmynda landsløg, býar- og bygdaløg og fólk. Stundum eru litirnir í myndunum hjá Fridu bjartir og sterkir, men ofta eru teir kámir og tunnir littónar. Í summum málningum valda jarðlitir. Í 1930- og 40-árunum legði málingarlag hennara dent á innihald og kenslur í myndini í samsvar við myndlistaligan romantikk, sum vil endurgeva tað stóra í náttúruni, tað sublima og tað algilda. Frá umleið 1950 fór Frida Zachariassen at mála meira abstrakt. Landsløgini og fólkini á myndunum vórðu loyst sundur í puntar, álir og tríkantar. Høvuðsverkini eru konstruktiónir settar saman av linjum, skapum og litum, sum eru mettaðir grønir við kaldligum bláum, gráum og viðhvørt svørtum linjum og umhvarvum. Hóast hesa abstraktión og skipaðu samanseting eru myndirnar hjá Fridu Zachariassen ongantíð non-figurativar; myndir hennara endurgeva altíð eitthvørt, sum kennist aftur.

Hjá Fridu Zachariassen er samband millum land og fólk sjónligt og týdningarmikið í landslagsmyndunum. Fólkini falla aloftast inn í landslagið, av tí at tey eru sett saman av skapum eins og landslagið. Fólkini á myndunum arbeiða: tey eru í fiski, gera útróðrarbát til reiðar at leggja frá landi, lossa, ganga eftir fjallagøtu, fara til handils, skera upp, hoyggja, flyta seyð á beiti.

Frida var úr Klaksvík og livdi megin partin av ævini har. Hon var borin í heim 1912 og doyði í 1992. Mamma Fridu var Magdalena Jacobsen úr Uppsølum og pápin Jógvan Rasmussen, Jógvan í Grótinum kallaður eftir plássinum haðani hann var ættaður, úr Grótinum innanvert Gøtueiði. Frida vaks upp saman við níggju systkjum. Í nógva virkseminum í Klaksvík fyrst í 20. øld stóð faðir hennara í fremstu røð.

Í 1927 fekk Frida millumskúlaprógv við sera góðum úrslitum. Hon tók handilsskúlaprógv í Keypmannahavn í 1937, men hon hevði eisini hug at útbúgva seg listaliga:

*"Hugur mín í ungum árum var mest at fáast við myndir, og fekk nakað av útbúgving í Keypmannahavn. Men rættiliga skilligt bleiv skjótt, at "kunstur" var ikki livibreyð. Hóast*



Málningur:
Frida Zachariassen

*føroyingar tá lættiliga kundu koma inn á Kunstakademiið uttan stórvegis fyrireiking, tí teir vóru so fáir, máttu 4 ár har haldast at vera heldur ónyttugt, og ov mikið dýrt. Fór tí á handilsskúla, og haðan á skrivstovu"*. Strev í málrøkt, s. 9.

Hon hevði snøgt sagt ikki umstøður at fara at læra eitt yrki, sum hon ikki kundi breyðføða hana. Í staðin fekk hon sær eitt livibreyð og gjørdi list framíhjá.

Krígsárini arbeiddi hon á skrivstovuni hjá Kjølbro í Klaksvík. Hon giftist í mai 1944 við Guttormi Zachariassen, men teimum untist bert stutt hjúnalag, tí hann doyði av vanlukku í februar 1945. Eftir kríggið fór hon aftur til Keypmannahavnar, har hon arbeiddi á skrivstovu til 1949. Tekningar frá tíðarskeiðinum benda á, at hon teknaði dúgliga, eitt nú gekk hon á *Statens Museum for Kunst* at tekna. Heima aftur hevði Frida Norðoya Sjúkrakassa um hond frá fyrst í 1950-árunum til 1972.

Serliga í 1950- og 60-árunum málaði Frida nógv. Seinast í 1970-árunum vóru eyguni farin at bila so illa, at hon skrivaði meira enn hon málaði.

Nógvar myndir eru úr Klaksvík og har um leiðir av landsløgum og úr arbeiðslívinum; men hon avmyndaði eisini aðrar landspartar. Litirnir eru ofta kontrastir settir upp hvør móti øðrum, reytt og grønt, blátt og grønt, reytt og blátt, sum geva ein dám, sum er kaldur og heitur í senn. 1950-árini vóru eisini tíðarskeiðið, tá ið hon menti tann serstaka kubistiska stílin. Harafturat var hetta tíðarskeiðið, tá ið hon fór at ferðast fyri at mennast listaliga.

Tey rýtmisku mynstrini og teir lýsandi litirnir í málningunum "*Kona*" og "*Urtagarður*", vísa tað framúrskarandi í sermerkta stíli Fridu. Hon hevur skapað list, har kubistisk skap savna merkingina og geva henni form og dýpd.

Malan Marnersdóttir

# Posthús við egnum stempli frá 1.1.2011

Vanligt dagstempul er á hesum posthúsum:

| |
|---|
| 100 Tórshavn |
| 766 Kirkja |
| 700 Klaksvík |
| 370 Miðvágur |
| 388 Mykines |
| 270 Nólsoy |
| 450 Oyri |
| 210 Sandur |
| 600 Saltangará |
| 240 Skúvoy |
| 765 Svínoy |
| 800 Tvøroyri |

Skrásetingarnummur til innskrivað brøv eru á hesum posthúsum:

| |
|---|
| 100 Tórshavn |
| 700 Klaksvík |
| 370 Miðvágur |
| 210 Sandur |
| 600 Saltangará |
| 800 Tvøroyri |

Í Tórshavn er eitt rullustempul og eitt maskinstempul.
Í Klaksvík og Saltangará er eitt rullustempul.

# Posthús í Føroyum



***SEPAC** stendur fyri Small European Postal Administrations Cooperation og eru 14 postverk limir í Sepac-bólkinum. Bólkurin hevur givið út tvær felags frímerkjaútgávur við heitinum "Landslag". Endamálið við Sepac-frímerkjunum er at seta fokus á tað felags samstarv millum postverkini, ið eru limir í Sepac, bæði mótvegis alheims filatelistbransjuni og frímerkjasavnarum til frama fyri filateli. Endamálið er eisini at gera fólk varug við søguna, náttúruna, landslagið og mentanina í londunum, har limirnir í Sepac hoyra heima*

# Føroyskt frímerki vinnur SEPAC kapping!

SEPAC frímerkjakappingin er av og vinnarafrímerkið gjørdist føroyska Sepac frímerkið, sum myndar vakurt sólsetur við Leynar. Frímerkið varð givið út tann 16. september 2009 og myndina hevur Ólavur Frederiksen tikið.

Sepac frímerki 2009 úr Íslandi gjørdist nummar 2 og á triðja plássi var eisini eitt føroyskt frímerki. Hetta frímerkið endurgevur eina mynd av gomlu Hoyvíkini við Nólsoynni í baksýni. Frímerkið varð givið út tann 1. oktober 2007 og myndina hevur Absalon Hansen tikið.

Frá mai til oktober 2010 bar til at velja vakrasta Sepac frímerkið, sum varð givið út í 2007 og 2009. Atkvøðan fór fram á heimasíðuni hjá Sepac og á ymiskum frímerkjaframsýningum í hesum tíðarskeiði.

Vinnarafrímerkið fekk 15,24% av øllum atkvøðunum.

Nr. 1:
Føroyar Sepac 2009




Nr. 2:
Ísland Sepac 2009




Nr. 3:
Føroyar Sepac 2007




www.sepacstamps.eu




# Vinningur á 6.000 evrur handaður John Hunderup!

Umframt frímerkjakappingina varð somuleiðis kastað lut um ein høvuðsvinning á 6.000 evrur millum tey, ið atkvøddu og tann hepni vinnarin gjørdist John Hunderup úr Danmark.

Harumframt varð kastað lut um 40 Sepac mappur og nøvnini á hesum vinnarunum síggjast á www.sepacstamps.eu.

Mánadagin, tann 24. januar 2011 handaði Svanbjørg Manai, leiðari á Frímerkjadeildini vinnaranum John Hunderup kekkin á 6.000 evrur. Kekkurin var handaður á Norðuratlantsbryggjuni, sum er Norðuratlantiski mentanarmiðdepilin í Keypmannahavn.

Aftanfyri hómast tveir málningar frá framsýning eftir Steffan Danielsen.

John Hunderup var sera fegin um vinningin, sum vera man. Hann hevur savnað føroysk frímerki síðan tey fyrstu føroysku frímerkini komu út í 1975 og eigur sostatt eitt fullfíggjað savn av føroyskum frímerkjum, sum hann er sera errin av.




# Vøkru SEPAC útgávurnar "Beautiful Corners of Europe"

**Eigur tú øll SEPAC frímerkini?**

Um tú ikki eigur hesi vøkru frímerki, so hevur tú møguleika at ogna tær øll í senn við at bíleggja Sepac-mappurnar 2007 og 2009 - antin í hesum blaði ella á www.stamps.fo.

Í mappunum eru øll tey frímerki, sum eru givin út í samband við Sepac felagsútgávurnar.

Limalondini í SEPAC *(Small European Postal Administration Cooperation)* eru í løtuni hesi: Áland, Føroyar, Gibraltar, Grønland, Guernsey, Ísland, Isle of Man, Jersey, Liechtenstein, Luxembourg, Malta, Monaco, San Marino og Vatikanið.

Næsta Sepac felagsútgávan er sett at vera tann 28. september 2011, og eins og undanfarin ár verða eisini hesi frímerki at fáa í snøggari Sepac mappu.






WOPA

World Online Philatelic Agency




# Føroysk frímerki á www.wopa-stamps.com

WOPA - World Online Filatelist Agency - hevur latið upp nýggja heimasíðu, sum er tann fyrsta av sínum slag.

Á hesi heimasíðu ber til at keypa nýggj frímerki og frímerkjavørur frá fleiri ymiskum postverkum í eini handavending. Í løtuni ber til at bíleggja frímerki úr Føroyum, Álandi, Gibraltar, Guernsey og Alderney, Jersey og Isle of Man og verða fleiri lond løgd afturat so við og við.

Frímerkjasavnarin kann leggja vørur frá øllum postverkum í eina keypskurv, síðan verður goldið eina ferð á eini trygdargóðkendari síðu og harumframt ber til at velja gjaldoyra.

Hendan nýskapandi og brúkaravinaliga heimasíða gevur savnarum í øllum heiminum ein einastandandi møguleika at keypa nýggj frímerki úr fleiri ymiskum londum til áljóðandi virði.

WOPA heimasíðan verður umsitin av frímerkjadeildini á Gibraltar, sum hevur ætlanir um at heimasíðan við tíðini skal umfata flestu postverk í heiminum.

Heimasíðan er á enskum, men verður at síggja á fleiri málum í 2011.

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 26. apríl 2011



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2011: Skógir** |
| Útgávudagur: | 26.04.2011 |
| Virði: | 10,00 og 12,00 kr. |
| Nummur: | FO 708-709 |
| Frímerkjastødd: | 28,8 x 38,4 og 38,4 x 28,8 mm |
| Myndir: | Anker Eli Petersen og Svanna Oknadal |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og smábrøv til Evropa, 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Bjargablómur** |
| Útgávudagur: | 26.04.2011 |
| Virði: | 14,00 og 20,00 kr. |
| Nummur: | FO 710-711 |
| Frímerkjastødd: | 27,0 x 36,0 mm |
| Tekningar: | Astrid Andreasen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja stórbrøv, 51-100 g, og stórbrøv til onnur lond, 0-50 g. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **List: Bergithe Johannessen** |
| Útgávudagur: | 26.04.2011 |
| Virði: | 2,00 og 24,00 kr. |
| Nummur: | FO 712-713 |
| Frímerkjastødd: | 40,0 x 27,5 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Miðalbrøv til onnur lond, 51-100 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **List: Frida Zachariassen** |
| Útgávudagur: | 26.04.2011 |
| Virði: | 6,00 og 26,00 kr. |
| Nummur: | FO 714-715 |
| Frímerkjastødd: | 26 x 40 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 g og miðalbrøv til Evropa, 101-250 g. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo